# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Torkil við Sandá 55 ár



Hósdagin 24. mars fyllir Torkil við Sandá, byggimeistari í Havn 55 ár.

Torkil er uppvaksin í Kaldbak saman við foreldrunum Herborg og Ingvard Petersen. Torkil er yngstur av 9 systkjum.

Torkil byrjaði í skúlanum í Kaldbak í 1957, men flutti til Havnar í 1961. Tann dagin, Torkil bleiv 14 ár, gavst hann í skúlanum. Longu 14 dagar seinni fór hann sín fyrsta túr til skips við "Vesturhavið Blíða".

Tá Torkil var 17 ára gamal, doyði pápi hansara, Ingvard brádliga av sjúku.

Torkil hitti damuna, Birgith Jacobsen, dóttir Solveig og Óla Christian Jacobsen á Dalavegnum, sum hann seinni giftist við.

Torkil er føddur sum ein skapandi og virkin persónur. Hann vildi gera okkurt handverk, og fór í læru sum timburmaður í 1969, - sama árið sum hann gjørdist pápi fyri fyrstu ferð.

Í 1973 fór Torkil til Íslands, og var við til uppbyggingararbeiðið á Vestmannaoyggjunum har aftaná gosfjallið.

Torkil smíðaði í Føroyum saman við øðrum, og sum sjálvstøðugur byggimeistari. Torkil situr ongantíð í friði, men hevur altíð onkrar góðar og áhugaverdar ætlanir. Mong kvøld hevur hann sitið og teknað ella bygt smá modell av hansara dreymahúsum, og hava hesi verið nógv í tali. Fleiri teirra eru blivin til veruleika, og íalt hevur hann bygt 5 hús til sín sjálvan, sum hann saman við familjuni hevur búð í.

Hann hevur eisini roynt seg sum seljara av ymsum, t.d hevur hann selt plastvindeygu og campingvognar.

Eftir eitt ferðsluóhapp sum kravdi mannalív, tá ein bilur fór á sjógv, menti Torkil ein skutil sum enn hongur runt í havnum og á útsettum plássum. Skutilin verður stungin ígjøgnum skrokkin á bilinum, og kann man so gerða ein enda fastan á bilin fyri at halda honum uppi, og harvið lætta um bjargingararbeiðið.

Tokil og Birgith eiga 5 børn, Beintu, John, Óla Christian, Herborg og Benny. Tað yngsta bleiv føtt tá Torkil var 30 ár. Sama árið hevði Torkil hug at royna okkurt nýtt, og byrjaði sum portørur á Landssjúkrahúsinum, har hann var í 20 ár.

Torkil hevur smíðað hús til øll 4 børnini sum búgva í Føroyum.

At Torkil gjørdist portørur, gjørdi ikki tað at hann helt seg vekk frá byggiarbeiðinum. Í 80´unum bygdi hann fleiri hús sum hann seldi.

Í ár 2000 segði hann starvið sum portørur frá sær, og byrjaði uppá fulla tíð við byggivirksemi sínum aftur. Hann hevur síðani bygt mong ymisk hús, bæði einkult, dupult í rekkjum og íbúðarblokkar.

Barna og familjukærur er Torkil sum fáur, og at hann hevur barnatekki kemur mangan til sjóndar. Mangan er hann til dømis í føðingardøgum umringaður av børnum sum dáma væl at spæla við hann.

Føðingardagurin verður hildin í felagshølinum í kolonihavanum í Løjbjerg í Hirtshals.

Hjartaliga tillukku við degnum, Torkil, og bestu ynski um nógv góð og virkin ár frameftir.

D.T

## Nýggj .FO nevnd




FO-ráðið er sjálvsognarstovnurin, sum hevur ábyrgdina av umsiting og nýtslu av teimum navnaøkjum, sum enda við .fo á alnetinum.

Nýggj nevnd varð vald fyri stuttum, og í hesi sita nú: Ísak N. Jacobsen, formaður, Ranvá Sólheim, næstformaður, Ingunn Eiriksdóttir og Óli Simonsen.

Tað er Vinnumálaráðið, sum eftir tilmæli frá KT-felagnum, ið setir nevndina.

-jm

## Gullbrúdleyp



19. mars kunnu hjúnini Hildigerð og Tróndur Johannesen halda gullbrúdleyp.

Dagurin verður hildin saman við børnunum.



## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum fyri hjálp
og sýnda samkenslu við deyða og jarðarferð hjá
góða pápa, abba, langabba og verpápa okkara

**Hans Jacob Guldbro**
**Leirvík**

Ein serstøk tøkk til tykkum í Vesturstovu í Fuglafirði og Giljagarði í Leirvík fyri tíðina, hann var hjá tykkum. Og tøkk til tykkum, sum kokkaðust í bygdarhúsinum.

*Heilsan*
**Osla, Mia, Lis, Sonja, Sakaris og Katrin**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu
tá ið pápi, abbi og langabbi okkara

**Karton Joensen**

doyði og varð jarðaður.

Tøkk til prest, sangarar og kirkjutænarar.
Tøkk til øll, ið á ymiskan hátt veittu hjálp.
Tøkk fyri blómur, kransar, heilsanir, vitjanir
og gávur.
Tøkk til alt starvsfólk á Suðuroyar sjúkrahúsi og
á Landssjúkrahúsinum, sum veittu honum
góða umsorgan.
Tøkk til tykkum øll, ið fylgdu honum til hansara
seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*
**Sigurður, Arni, Helgi, Kristi og**
**Amanda Joensen við familju**